

Krystle, Blake og Alexis verða nú at síggja á filmsløriftinum

# Dollars – nú sum filmur

**EINAFERÐ** UM VIKUNA **RUDDAÐI** KENDA AMERIKANSKA **SENDIRØÐIN »DOLLARS«** GØTURNAR, OG TAÐ VÓRU **SERA** NÓGVIR **FØROYINGAR**, SUM **TRÚLIGA** FYLGDU VIÐ Í **LÍVUNUM** HJÁ FAMILJUNI **CARRINGTON**



FILMUR
Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo

Vit »hildu við« buisnessmanninum Blake Carrington og vøkru konu hansara, Krystle – og vit øtaðust av tí, sum útspekuleraða ekskonan, Alexis, fann uppá.

Dollars er onkusvegna ein ímynd av 80'unum, tí røðin byrjaði í 1982 og gekk í samfull sjey ár á rað. Men nú er ætlanin at blása lív í aftur gomlu røðina við at innspæla hana sum film.

Esther og Richard Shapiro, sum vóru fólkini handan røðina, siga, at tíðin nú er komin at endurskapa Dollars.

Eftir øllum at døma fer filmurin at snúgva seg um Blake Carrington, tá hann var ungur, og tá hann møtti Alexis afturi í 60'unum. Um vit fara at síggja nakað til Krystle, sigur søgan einki um.

Men filmurin fer at hava ein nógv størri figgjarkarm enn sjónvarpsrøðin hevði, og fyrireikararnir lova eisini meiri action og fleiri heitar ástarleikir, enn røðin vísti.

Tað var John Forsythe, sum spældi Blake Carrington. Han doyði í fjør, 92 ára gamal.

Krystle varð spæld av Lindu Evans, sum í dag er 68 ára gomul, og Alexis var spæld av Joan Collins, sum nú er vorðin 77 ár.

Enn er einki sagt um hvørjir leikarar skulu gera teimum kynstrið eftir og verða við í filminum.

Hvussu er og ikki, so verður tað óivað nostalgi fyri allar pengarnar. Antin tað – ella eitt fullkomið kiks. Livst so spyrst.

## INNIHALD

2 KLUMMA: EG OG ERLING
4 BAKGRUND: Í JESU NAVNI, GEV MÆR TÍNAR PENGAR
6 TIPS: PERFEKTU BRILLURNAR
8 2010 EITT VANLUKKUÁR
10 HEILSUSÍÐAN: METT VIÐ FÆRRI KALORIUM
11 90 SEKUND: BARBARA HOLM
12 NORÐURLENDSKI STATURIN SKAL BJÓÐA HINUM AV
14 TIL ARBEIÐIS: VÍGDIS JOHANNESEN
15 UMAFTURAFTURUM: HØGNI DJURHUUS
16 EIN HEIMUR AV MÁLSLIGUM FJØLBROYTNI
22 MIÐLAMJARR: TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM
23 TAÐ HENDIR: KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ
24 VIKUMYNDIN: SKOYTUPRINSESSA

VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eydna Skaale
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Vígdis Johannesen / Jens Kristian Vang

## KLUMMAN



Inna Törnroos

# Eg og Erling!

Tit kenna kanska kensluna – tá ein sær ein kendan persón ella ein, ið ein hevur stóra virðing fyri – beinini gerast til gelé og summarfuglarnir leika í í búkinum.

Eg havi uppliva tað nakrar ferðir: Tá eg skuldi gera eina samrøðu við Carolu – tá Will Smith kom inn í sama rúm sum eg var í – og tá eg skuldi samanføra dólgarnir á jólum 2009.

Tey fyrstu bæði gingu uppá stás. Samrøðan við Carolu bleiv góð, og Will Smith var so upptikin av øllum blondinunum rundan um seg og sá ikki, tá eg royndi at geva honum eitt blendandi smíl!

Verri var tað við dólgunum. Eg helt at tað ljóðaði sum eitt frálíkt hugskot at samanføra teir tríggjar, Ega Dam, Hans Jacob Hermansen og Erling Eysturoy, tá røðin aftur var at síggja í jólakalendaranum. Teir vóru við uppá hugskotið, men tað var eitt sindur torført at finna eina tíð, sum passaði øllum. Vit broyttu nakrar ferðir og hvussu tað nú var, so fekk Erling ikki tey seinastu boðini...

Erling, sum starvast sum chafførur kom uppá prikkin kl 17 inn í Miðlahúsið. Hann tivaði næstan og hevði skundað sær.

Eg hugdi bilsin upp, tí tað var ikki meiningin, at teir skuldu koma fyrr enn kl 18.

Erling bleiv í øðini. Hann hevði lagt allan dagin um fyri at náa samrøðuna við hinar dólgarnar, hevði skundað sær og noyddist aftur til arbeiðis um kvøldið, tí hann ikki kláraði at gerast liðugur áðrenn kl 17 – og har stóð eg. Hevði onga góða forklároing og besti dólgurin Bjartur – fantastiski Erling Politistur – ERLING var óður við MEG!

Eg ristist sum eitt bókablað. At Erling var illur, var verri enn at Carola hevði langað rørið á, ella at Will Smith hevði gálvað eftir mær.

Skelkað fór eg yvir aftur til telduna og vónaði ikki, at alt arbeiðið at savna teir tríggjar var til fánýtis.

Erling fór út. Egi og Hans Jákup komu, og eg kom niður á jørðina aftur. Tað gjørdi Erling eisini, tá hann kom aftur nýbrúsaður og í reinum klæðum. Samrøðan bleiv gjørd bæði til Rásina og Sosialin – og teir tríggir vóru júst so fittir og stuttligir, sum eg hevði væntað mær.

Dólgurin í hesum føri var eg.

